

# Fá allar heimsins møguleikar

**FJARLESTUR** 60 % av føroyskum lesandi lesa uttanlands. Bara helvtin av teimum koma heimaftur eftir loknan lestur. Tí er nú ætlanin at fáa føroyingum góðar útbúgvingarmøguleikar til Føroya. Loysnin er fjarlestur

Eydna Skaale

Umleið helvtin av teimum, sum fara uttanlands í lestrarørindum siga, at um tey høvdu havt møguleika at lisið her heima, so høvdu tey ikki farið av landinum. Tí er alneyðugt, at stig verða tikin til, at ungdómurin fær høvi at útbúgva seg í Føroyum. Betri fjarlestrarmøguleikar eru ein liður í ætlanunum um at fáa ungfólk at vera verandi í Føroyum. Serliga skeiva gongdin av ungum kvinnum, sum hvørt ár hvørva út í heim má steðgast nú, og eisini her verður hildið, at fjarlestur er ein loysn.

### Lestrarstuðul til lesandi

Longu nú eru nakrir møguleikar, t.d. hevur Føroya Handilsskúli havt samstarv við Robert Gordon University í Skotlandi, Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum hevur havt samstarv við Mittuniversitetet í Svøríki, umframt at Handilsskúlin á Kambsdali hevur bjóðað FHS- og HH útbúgvingar umvegis fjarlestur.

Nú skal útboðið tó víðkast, og ætlanin er eisini at lata lestrarstuðul til teirra, ið fara undir fjarlestur. Tað er nevniliga ikki eitt tilboð í dag. Lestrarstuðulin fer at verða latin í mun til hvussu nógvar tímar, tú lesur. Ein leistur er, at tey lesandi fáa lán, tá tey byrja, og so hvørt sum próvtøkurnar koma í hús, verður lánið strikað og umlagt til stuðul.

### Deplar kring landið

Ætlanin er at skapa nakrar deplar fyri fjarlestri runt um í Føroyum. Royndir uttanlands vísa, at tað er týdningarmikið, at tey lesandi kunnu koma saman, og tí er eitt uppskot, at eitt fjarlestrarumhvørvi í Føroyum kundi verið knýtt at miðnámsskúlunum.

Tað skal eisini vera lættari at sameina ymsar møguleikar, og at seta eina útbúgving saman av nærlestri á Fróðskaparsetrinum og fjarlestri úti í heimi.

### Nógv fleiri møguleikar

Við tað, at Fróðskaparsetrið og aðrir útbúgvingarstovnar kunnu víðka um síni útbúgvingartilboð, verður helst sannlíkt, at fleiri føroyingar fara at nema sær útbúgving her heima umvegis fjarlestur. Hetta er eisini eitt gott tilboð til teirra, ið av ymsum orsøkum ikki kunnu fara av landinum at lesa, og teirra, ið eru komin eitt sindur upp í árini.

Hetta er eisini ein bílig loysn, sum ikki kostar Fróðskaparsetrinum nakað.

eydna@sosialurin.fo



*Eg havi altíð hildið, at tað besta er at sita á einum skúlabeinki og læra, men tað haldi eg ikki longur, sigur Árni Joensen á Oyri, ið er undir útbúgving á Berklee musikkskúlanum í Boston*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Býr á Oyri – lesur í Boston

**FJARLESTUR** – Eg havi altíð hildið, at tað besta er at sita á einum skúlabeinki og læra, men tað haldi eg ikki longur, sigur Árni Joensen á Oyri, sum tekur ljóðútbúgving á Berklee skúlanum í Boston

Eyðun Klakstein

Árni Joensen á Oyri tekur í løtuni útbúgving á Berklee musikkskúlanum í Boston. Ikki tí, at hann hevur skift Oyri út við amerikanska stórbýin, men tí hann umvegis fjarlestur er sloppin fram at kenda amerikanska skúlanum.

Hann tekur í løtuni fyrsta part av eini útbúgving í ljóðblandi og mastering – Mixing And Mastering. Útbúgvingin tekur tríggjar ferðir 14 vikur, og øll útbúgvingin verður tikin umvegis internetið.

– Eg havi altíð hildið, at tað besta er at sita á einum skúlabeinki og læra, men tað haldi eg ikki longur. Eg eri imponeraður av, hvussu væl tað ber til at taka útbúgving umvegis internetið, og eg havi rættiliga fingið hug at halda fram við hesum, sigur Árni Joensen.

### Avger sjálvur

Undirvísingin á fjarlestrinum hjá Berklee gongur fyri seg á tann hátt, at Árni Joensen skal arbeiða sjálvstøðugt við ljóði, og hvørja viku skal hann avlevera eitt projekt, sum hann byggir víðari á. Í hansara føri er tað ein sangur, sum hann arbeiðir við og leggur afturat.

– Eg havi ein lestrarvegleiðara knýttan at mær. Hann fylgir við í tí, sum eg geri, og so er ein lærari knýttur at okkum, sum taka hetta skeiðið. Hvørja viku fái eg viðmerkingar frá læraranum, og tað eru detaljeraðar viðmerkingar um tað, sum eg havi gjørt. Eisini fái eg ein karakter hvørja viku, so eg veit, hvussu tað gongur, greiðir Árni frá.

Hvørt sunnukvøld skal uppgávan latast inn, og hon byggir á tað, sum Árni hevur lært ígjøgnum vikuna.

– Hetta er ein góður máti at taka eina útbúgving, tí eg kann avgera sjálvur, nær eg lesi og geri projekt, men tað er sjálvandi neyðugt at seta nakað av tíð av til hetta og at avlevera uppgávurnar til tíðina, sigur hann.

### Heldur fram

Árni Joensen er í holt við fyrsta partin av útbúgvingini, og avger sjálvur, nær hann tekur restina, men ætlanin er avgjørt at halda fram við lesnaðinum.

– Eg vil gjarna hava eina útbúgving á hesum økinum. Eg havi fingist nógv við tónleik og ljóðbland og havi hildið meg vita alt, men eftir at eg eri farin undir hesa útbúgvingina, havi eg funnið út av, at eg havi vitað lítið, og tí er hugurin stórur at læra meira, sigur hann.

Hvørt skeiðið á útbúgvingini hjá Árna kostar umleið 8000 krónur, men tað krevst eisini, at hann hevur nakað av útgerð og forritum, sum skulu brúkast til útbúgvingina.

eydun@klakstein.fo